## SAMLAGSTRYGGINGINGIN HJÁ LIMUNUM

Allir virknir limir felagsins kunnu vera við í Samlagstryggingini.

Tryggingargjaldið hjá teimum, sum hava eftirlønarskipan hjá **LÍV**, verður drigið frá inngjaldinum til eftirløn og hesir limir ella teirra arbeiðsgevarar skulu sostatt ikki gjalda serstakt tryggingargjald.

**Tryggingarupphæddir, galdandi frá 1. oktober 2015 hjá LÍV:**
Um limur doyr: kr. 700.000,-
Høvuðsupphæddin lækkar frá 50-ára aldri við kr 25.000 hvørt ár til upphæddin er kr. 300.000
Um hjúnafelagi/sambúgvi doyr: Hálv høvuðsupphædd
Um limur fær hættisliga sjúku: kr. 125.000,-
Um barn hjá limi fær hættisliga sjúku: kr. 125.000,-
Tryggingin er galdandi til limur er 67 ár

Limir, sum **ikki** hava eftirløn hjá LÍV
Hesir limir skulu rinda tryggingargjaldið kr. 350 um mánaðin við fastari flyting á konto 6460-180.702.3 í BankNordik.

**Leiðbeining**
Ynskist nærri leiðbeining ert tú vælkomin at seta teg í samband við LÍV ella Føroya Skipara- og Navigatørfelag.